# verða teknað

Journalistforbund, og er einasti av teimum fýra, sum situr heima og teknar. Hann hevur 40 ára jubileum í ár og hevur millum annað starvast á Land og Fólk, í Berlingska húsinum og sum freelancari í 5 ár nú.

– Blaðteknarar eru limir í einum sersambandi undir Danmarks Journalistforbund, sum samráðist teirra vegna, á jøvnum føti við jounalistar og fotografar, greiðir hann frá.



*Norðurlendskir blaðteknarar á floti saman við Martin Restorff*

## Sjónleikarateknarar

Claus Seidel er tann einasti av teimum fýra, sum ikki teknaði sum barn, men tá hann var eini 14 ár, fekk hann eyguni upp fyri blaðtekningini, og hann helt hana vera fantastiska, stuttliga og ómetaliga spennandi. Hann sigur, at hann sat framman fyri sjónvarpinum og teknaði øll ungdómsárini, meðan vinirnir runnu eftir konufólki og gingu í studentaskúla. Síðani fór hann úr stovuni, út á vegin at tekna og inn í Tivoli. Eitt skifti gekk hann á málaraskúla at læra til skelta- og bygningsmálara, og um somu tíð var víðagitni teknarin Jan Stage mentanarredaktørur á navnframu donsku avísini Land og Folk. Tá hesin fekk eyga á einastandandi listagávurnar hjá Claus Seidel, skipaði hann fyri, at ungi teknarin fekk starv á blaðnum, sum teaturteknari. Og Claus Seidel greiðir frá, at danir hava eina elligamla siðvenju, sum fevnir um, at sjónleikaraumæli altíð verða prýdd við tekningum frá frumframførslunum. Sostatt teknaði Claus Seidel myndir til meiri enn 200 ummæli av leikum, sum vóru framførdir í Keypmannahavn.

## Ikki lúra

Tá vit síggja ein persón, sum stendur í einum króki og teknar, hava vit eina ómetaliga trongd til at fara yvir og vita, hvat tað er, sum viðkomandi teknar. Hvat halda blaðteknararnir um tað?

– Tað er til at blíva svakur av, tá fólk standa og anda ein í nakkan, meðan tú teknar, sigur Claus.

– Tá gongur alt galið, tí báðir partar savna seg bara um, at annar teknar og hin metir, sigur Claus Seidel. Og hann greiðir frá, at tá fólk nærkast, so snúgvar hann sær demonstrativt á at signalera, at hann vil hava frið.

– Fyri meg er tilgongdin ógvuliga nakin og tað er sum at lata seg úr, at vísa eitt hálvliðugt verk, sigur hann. Men hesum eru ikki øll samd um.

Men tey eru samd um, at tað ringasta er, er tá onkur heldur seg vera ordiliga genialan, og kemur við einum hugskoti, sum bara er til í høvdinum á viðkomandi.

– Tað miseydnast altíð, tí tað ber ikki til at síggja, hvussu viðkomandi ímyndar sær tekningina. Hetta eru typiskt ógvuliga málslig fólk, sum hava eina langa frágreiðing og nógv orð, siga tey.

– Slík fólk skilja ikki tí journalistisku avbjóðingina hjá blaðteknaranum – at taka søguna og siga hana í stuttum við eini tekning, sigur Lars Andersen, sum hevur verið blaðteknari síðani 1986, eitt langt skifti á Politiken, og síðani sum freelancari við fastari avtalu við Berlingarin. Hann vaks upp í Vendsyssel í Jútlandi og pápin var lærari í eitt nú evning og smíð. Skúlin lá næst heiminum, og Lars Andersen sigur, at meginparturin av barndóminum fór fram í skapandi hølunum á skúlanum. Beiggin var eisin framúrskarandi teknari, og Lars Andersen endaði við at fáa eina teknaraútbúgving frá Listahandverkaraskúlanum í Kolding.

## Viðurkenning at vera teknað

Men hvat siga fólk, tá tey vera teknað?

– Fólk halda ongantíð, at tey líkjast tekningunum. Men øll onnur duga at síggja hvønn talan er um, siga tey við ein munn og øll fara at flenna.

– Tað løgna er, at tá fólk verða teknað, so uppstendur ein løgin tvístøða, tí innast inni eru tey forfeingilig, og vera eitt sindur vónbrotin av at verða endurgivin av einum karrikaturteknara. Hinvegin er tað, at verða teknaður eisini ein viðurkenning av, at nú ert tú kend ella kendur, og at tú tí hevur rokkið einum ávísum støði í karrieruni. Greiðir Lars Andersen frá, og hann vísir á, at so løgið tað ljóðar, so eru tað júst kend fólk, sjónleikarar og politikarar, sum keypa flest blaðtekningar, har tey sjálvi eru avmyndað. Tá eru tey "genkendt, anerkendt og godkendt".



*Finn Graff til arbeiðis í Vágsbotni*